Til Rættarnevndina Hoyvík, 30. apríl 2019

Viðmerkingar til løgtingsmál nr. 129/2018: Uppskot til løgtingslóg um elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (Eltrygdarlógin)

Í sambandi við omanfyri nevnda lógaruppskot skal Bóndafelag Føroya koma við viðmerkingum til uppskotið.

Sambært alemnnu viðmerkingunum til lógaruppskotið er endamálið við uppskotinum, at reglurnar bæði í sjálvari lógini og í nýggju kunngerðunum verða einfaldari og nútímansgjørdar, fyri at tryggja eina lóggávu við rúmd fyri tøkniligu menningini, samstundis sum tað verður tryggjað, at elektriskur útbúnaður, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar hava eitt trygdarstøði, sum ikki er til vanda fyri persónar, húsdjór ella ogn.

Lógaruppskotið kemur í staðin fyri verandi sterkstreymslóg og inniheldur nútímansgerð av teknisku reglunum, sum í dag eru í sterkstreymsreglugerðini, fyri í størri mun at nýta evropiskar og altjóða standardir.

Fyri Bóndafelagið og limir felagsins er tað parturin av uppskotinum, sum snýr seg um at kunna gera inntriv í og ognartaka jørð, sum viðkomandi.

Í §§ 26-32 eru ásetingar um at leggja leiðingar í jørð móti endurgjaldi og at ognartaka til leiðingar og mastrar v.m. Hetta er líknandi heimildir sum í verandi sterkstreymslóg, §§ 12-18. Tó skjýtur landsstýrið nú upp at taka burtur rættin at kæra um avgerðir hjá Elnevndini um endurgjald til jarðareigarar og brúkarar fyri ampar av fyrireikingararbeiði á teirra ogn. Víst verður til § 28, stk. 3 í uppskotinum, har eingin kærurættur er longur, móti § 14, stk. 3 í verandi lóg, har tey, ið eru fyri inntrivi, hava rætt at kæra.

Ikki sæst í upskotinum, hví hesin rættur at kæra um avgerð hjá Elnevndini um endurgjald til jarðareigaran ella brúkaran skal strikast. Bóndafelagið metir ikki, at taða neyðugt enn minni nøktandi, at ein rættur at royna fyrisitingarliga avgerð um endurgjald hjá hægri myndugleika verður tikin burtur uttan haldgóða orsøk. Í serligu viðmerkingunum til § 28, stk. 3 er ikki ávíst slík orsøk, og tað er ikki nøktandi, at hesin myndugleiki skal verða einasta og evsta fyrisitingarvald sambært Eltrygdarlógini.

Ognin viðmerking er sostatt um, hví vikið verður frá grundleggjandi meginreglum um at hava rætt at kæra eina fyrisitingarliga avgerð til hægri fyrisitingarmyndugleika. Hetta er í stórari andsøgn við gongdina innan nógv rættarøki, har styrkt verður um kærurættin og kæruviðgerðina av fyrisitingarligum avgerðum, sum raka privat og onnur.

Við atliti til rættartrygdina eigur kærurætturin um avgerðir hjá Elnevndini sambært galdandi lóg tí generelt at verða tikin við í nýggja uppskotið.

Sambært § 33 í uppskotinum hevur landsstýrið – eftir at onkur aktørur hevur søkt um hetta og Elnevndin hevur givið ummæli – fingið sær heimild at ognartaka lendi til útbúnað til framleiðlæsu, flyting, býti og goymslu av elmegi.

Sambært tí eina brotinum, sum eru fáorðaðu serligu viðmerkingarnar til § 33, so samsvarar ásetingin "..við redaktionellar broytingar til § 19 í galdandi lóg. Ásetingin snýr seg um ognartøku til útbúnað til framleiðslu, flyting, býti og goymslu av elmegi. Tó er "goymslu av elmegi" lagt afturat við tað, at lógarøkið eftir uppskotinum eisini fevnir um goymslu av elmegi."

Bóndafelagið skal vísa á, at við hesum uppskoti er ikki bara talan um redaktionellar broytingar í lógartekstinum, men innihaldsliga víttfevnandi víðkan av einari heimild at taka annans ogn til ein umsøkjara/framleiðara, sum biðir landsstýrið um lendi til sítt virksemi.

Slík víttfevnandi víðkan av rættinum hjá tí almenna til at gera inntriv í privata og aðra ogn krevur tungtvigandi grundgevingar. Slíkar síggjast ikki ávíst í uppskotinum og Bóndafelagið skal staðiliga mæla frá, at hesin parturin av uppskotinum verður samtyktur.

Ognartøkuheimildin er serliga óheppin, tá atlit verður havt til, at nútímans festi og jarðrarbrúk er annað og meira enn bara at hava neyt ella seyð. Tilfeingið á garðinum fevnir eisini um at skipa ferðavinnu, framleiðslu av øðrum vørum enn mjólk og seyðakjøti, at søkja til orkumyndugleikan um at framleiða elorku v.m.

Sostatt vil eitt ognartøkuinntriv frá landsmyndugleikanum verða enn meira inntrívandi enn tá Sterkstreymslógin bleiv samtykt á sinni, tí viðurskiftini við fríaðir kapping, umsetiligum festibrøvum og nýtslan av garðinum og tilfeinginum har er grundleggjandi broytt seinastu árini.

Altit má eisini havast til, at eitt ognartøkuinntriv, eins og onnur inntriv í festilendið, konkret er eitt inntriv, sum vil órógva og gera vinnumøguleikarnar hjá festarum verri. Tí skulu serstakligar góðar orsøkir verða til tess í einstaka førinum, og hetta skal bara kunna bera til, um ikki aðrir møguleikar eru. Tað tekur lógaruppskotið ikki hædd fyri.

Sambært lóg um landsjørð er frammanundan ein mannagongd fyri, hvussu almenna jarðarfyrisitingin kann avhenda jørð, antin til ognar ella leigu, sí §§ 7 og 9 í teirri lógini. Tá so er, er púra óneyðugt at ein annar partur av landsfyrisitingini útvegar sær heimild at ognartaka somu jørð, heldur enn at virða galdandi lóg og mannagongdirnar har.

Avleiðingin av uppskotinum vil tí vera, at jarðarfyrisitingin fullkomiliga verður koblað av og ikki virkar sambært lóg um landsjørð, tí landsstýrismaðurin í orkumálum via Elnevndina kann játta einum umsøkjara, at tað lendi, sum viðkomandi søkir um, skal verða ognartikið til viðkomandi. Hetta er ikki nøktandi.

Lógaruppskotið tekur hartil ikki atlit til avleiðingarnar fyri festarar og ognarar, sum vilja verða, um jørð verður ognartikin.

Flestu festi og brúk hava skuld til kreditorar, og fyri hesa skuld er festið/garðurin veðsettur, eins og festarin/bóndin heftir persónliga fyri skuldini. Festarin/bóndin skal sotstatt, grundað á tilfeingið á garðinum, kunnu vinna sær so mikið av peningi, at skuldin kann forrentast og fyri at hava til dagin og vegin.

Minkar garðurin í vavið ella verða inntriv gjørd í festið/garðin v.m., so er ein avleiðing, at grundarlagið at reka vinnuligan landbúnað gerst verri. Hetta er tað, sum t.d. hendir ferð eftir ferð og er hent javnan seinastu árini á festinum, tá lendið verður selt burturav til kommunalar útstykkingar v.m. Hetta vil sjálvsagt eisini verða avleiðingin, um landsstýrismaðurin í orkumálum skal játta ymiskum umsøkjarum at ognartaka lendi til teirra verkætlanir.

Sum uppskotið er orðað vil festari ikki fáa nakra kompenastión fyri slíkt inntriv – hvørki í mun til, at veðskuldin til kreditorar verður minkað lutfalsliga, so hvørt sum ognartikið verður burtur av pantinum og grundarlagið hjá bóndanum at rinda skuldina harvið minkar, ella við at stig verða tikin til at minka um útreiðslur bóndans, sum inntøkurnar frá garðinum skulu fíggja, t.d. við at fremja ábøtir ella tiltøk, ið annars kosta garðinum pening.

Heta er heldur ikki nøktandi.

Hartil er tað so, at festibrøv eru umsetilig, men við áhaldandi inntrivum via sølu og nú eisini til ognartøku til onnur endamál enn landbúnað, verður eisini gjørt inntriv í virðið á festinum fyri festaran persónliga. Heldur ikki hesum tekur uppskotið hædd fyri.

Ein lendisreduktión hevur sostatt beinleiðis fíggjarligar avleiðingar við sær fyri bóndan – eisini persónliga í mun til veðskyldur hansara, men tá ognartikið verður, fær hesin ikki á nøktandi hátt endurgjald fyri sín miss. Hetta er ikki nøktandi, og hesum kann t.d. ein festikonto ikki bøta uppá, uttan at lóggávan tekur hædd fyri, at umsøkjari til lendið, ið verður ognartikið, eisini skal rinda part av endurgjaldinum til festaran at niðurrinda ta skuld, sum lendið, ið ætlanin er at ognartaka, er veðsett fyri. Harumframt má rindast beinleiðis endurgjald til festaran fyri virðisminking av umsetiliga festibrævinum, men hesum er heldur ikki tikin hædd fyri.

Lógarupskotið virðir ikki, at festarar sambært lóg um landsjørð hava kærurætt til landbúnaðarstevnu og yvirlandbúnaðarstevnu tá festijørð verður seld/tikin av jarðarfyrisitingini.

Fyriliggjandi uppskot brúkar mannagongdina í 1881-lógini, ið heimilar kommunum at ognartaka við kærurætti hjá ognara og brúkara til landsstýrið. Tá landsstýrið innsetur seg um myndugleikan eftir 1881-lógini at taka avgerð um ognartøku sæst eingin hægri myndugleiki at kæra til. Tað er heldur ikki nøktandi, at ognartøkuavgerð ikki kann roynast innan fyrisitingina (bara endurgjaldið, sum metingarnevnd kann taka avgerð um), sí viðmerkingarnar omanfyri.

Samanumtikið skal Bóndafelag Føroya harðliga mótmæla, at § 33 í uppskotinum verður tikið við og verður mælt løgtinginum til at strika ásetingina ella broyta og avmarka hana munandi, tí tørvur og orsøk til slíka víttfevnandi heimild er ikki til staðar.

Til kunningar skal verða viðmerkt, at Føroya Óðalsfelag hevur sæð hetta skriv og tekur fult undir við iðmerkingum.

Vegna Bóndafelag Føroya

Sigert Patursson, formaður